Kyndil-VÍF 35-27(20-11):

# Føroyameistararnir avsmurdir

**Nýklaktu føroyameistararnir úr VÍF blivu avsmurdir, tá ið teir sunnudagin vitjaðu Kyndil í Havn**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Bara lítið korter megnaði VÍF at fylgja við, áðrenn Kyndil so ruddiliga setti seg á dystin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ársins seinasta útgáva av klassikaranum millum Kyndil og VÍF gjørdist als ikki tað, sum vit eru von við at síggja, tá ið hesi bæði lið hittast. Vestmenningar høvdu longu tryggjað sær FM-heitið, og tí tóku teir sær eitt sindur av løttum, meðan kyndilsmenn hinvegin fegnir vildu hava uppreisn fyri seinastu ósigrarnir móti arvafíggindunum.

Karmarnir til dystin vóru heldur ikki teir somu sum vanligt, tí einans 100 áskoðarar vóru. Um tað var manglandi spenningurin í kappingini ella kavaveðrið, sum vóru orsøk til tess, er ilt at meta um, men helst var tað ein blanding av báðum.

### Avgjørdu fyri steðgin

Tað var bert fyrsta korterið av dystinum, at nakar spenningur var í, tí tað var skjótt, at heimaliðið Kyndil legði sjógv millum seg og mótstøðumenninar. Tað var ógvuliga týðuligt, at tað var stórur munur á motivatiónini hjá liðunum báðum.

Kyndil setti av álvara ferð á, tá ið farið var um fyrsta korterið, meðan VÍF steðgaði fullkomiliga upp. Heimaliðið var á odda 12-11, tá ið tíggju minuttir vóru til hálvleiks, men seinastu tíggju minuttirnar av fyrra hálvleiki skoraði Kyndil átta ferðir, meðan VÍF einki mál fekk afturat fyri steðgin.

Tí var dysturin í veruleikanum avgjørdur, tá ið komið var til hálvleiks, tí tá var Kyndil á odda 20-11, og hóast vestmenningar hava eitt serstakliga gott lið, so var tað neyvan nakar, ið væntaði, at teir fóru at koma afturíaftur.

### Tættari eftir steðgin

Í seinna hálvleiki kom VÍF nakað fyri seg, men tó var tað ongantíð soleiðis, at teir fóru at nærkast Kyndli og spenningur kom í aftur. Kyndil helt munin til føroyameistararnar, men í mun til fyrra hálvleik megnaðu teir nú ikki at økja støðugt um leiðsluna.

Vestmenningar tóktust ikki serliga ávirkaðir av dygga ósigrinum, men tað tóktist heldur sum um, at teir nú bara bíða eftir komandi leygardegi, tá ið teir fáa steyp og heiðursmerkir handað í Vestmanna, og teir síðani kunnu halda gullveitslu, áðrenn farið verður í summarfrí.

Innsatsturin hjá VÍF sunnudagin á Hálsi kundi meiri samanberast við summarhondbólt, har størsti denturin verður lagdur á at hugna sær. Hinvegin eru kyndilsmenn óivað sera fegnir um at hava vunnið so greiðan sigur á føroyameistarunum, og sigurin merkti eisini, at Kyndil framvegis er eitt stig framman fyri strandingar á silvurplássinum.

Tá ið seinastu dystirnir á árinum verða leiktir komandi leygardag, skal Kyndil spæla móti grannunum úr Neistanum, meðan VÍF í Vestmanna fær vitjan av steypavinnarunum úr StÍF. Hjá báðum liðum verður óivað talan um truplar dystir.

Neistin var ógvuliga sannførandi í Hoyvík sunnudagin, og teir vunnu eisini seinasta dystin móti Kyndli.

Í Vestmanna ætla vestmenningar sær neyvan at taka sær so mikið av løttum, sum teir gjørdu í Havn sunnudagin, tí teir mongu trúfastu áskoðararnir vilja fegnir enda árið við einum sigri, og tað vilja spælararnir ivaleyst eisini.

### Kyndil-VÍF 35-27 (20-11)

Kyndil: Josef Abrahamsen 7(2), Høgni Klein 7, Finnur Hansson 7, Hans Áki Dal-Christansen 4, Jakob Jónsson 4, Janus Einar Sørensen 4, Rókur Akralíð 2
VÍF: Harald Bjørgvin 5, Áki Olsen 5(2), Daniel Rapa 4, Agnar Joensen 3, Sámal Joensen 2, John Zachariassen 2, Jákup Súni Andreasen 2, Sjúrður Poulsen 2, Áki G. Olsen 1, Johnny Joensen 1
Brotskøst: Kyndil 4(2), VÍF 3(2)
Útvísingar: Kyndil 3, VÍF 6
Dómarar: Dánjal Samuelsen og Kristian Johansen
Áskoðarar: 100

H71-Neistin 26-41(12-21):

# Tættari í botninum

**Við einum stórsigri á H71 í Hoyvík sunnudagin, syrgdi Neistin fyri, at tað gjørdist munandi tættari í botninum í Atlantic Airways kappingini**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*

Botnliðið Neistin gjørdi eitt ordans hál sunnudagin, tá ið teir vitjaðu H71 í Hoyvík. Neistin var greitt botnlið undan dystinum, men nú er møguligt hjá teimum at vinna seg fram um hoyvíkingar á stigatalvuni, tá ið seinasta umfarið verður leikt komandi vikuskifti.

### Saknur í Halgir

Hoyvíkingar vóru nøgv skerdir til dystin sunnudagin. Liðskiparin, Halgir Dahl Olesen, var ikki við, tí hann er uttanlands í arbeiðsørindum, og tað er einki dulsmál, at Halgir hevur ovurhondsstóran týdning fyri liðið hjá hoyvíkingum. Harafturat var Piti Negru heldur ikki við, og sostatt manglaði H71 tveir teir bestu skjúttarnar hjá sær.

Hinvegin var Levi Nybo aftur í málinum hjá hoyvíkingum, eftir at hann hevur verið uttanlands í nærum ein mánað, og tað er ein styrkur fyri liðið.

### Avgjørdu beinanvegin

Tað sást beinan vegin í dystinum, at Neistin var betra liðið. Neistamenn tóktust nógv meiri uppsettir, og teir vóru nógv ágrýtnari enn mótstøðumenninir.

Hetta sást eisini aftur á máltalvuni, tí gestirnir løgdu seg beinan vegin eitt gott petti fram um heimaliðið. Fyrr hálvleikur var ikki meiri enn hálvrunnin, tá ið Neistin hevði lagt seg á odda 14-5, og so var allur spenningurin væl og virðiliga farin úr dystinum.

Neistamenninir koyrdu við fullari ferð, og munurin millum liðini var sjónligur. Meðan neistamenninir høvdu ein góðan gejst, so var ilt at fáa eyga á nakað líknandi hjá H71.

### Allir komu á máltalvuna

At dysturin ikki serligan áhuga millum manna, er einki at taka seg aftur í. Einans 23 gjaldandi áskoðarar vóru til dystin, og tað sigur ikki so lítið.

Men teir 23 áskoðararnir sóu Neistan spæla ein tann besta dystin, ið liðið hevur spælt í hesum kappingarárinum. Liðið hevur av álvara tikið tikið seg fram seinastu umførini, men tað er nakað seint at raka toppformin nú.

Sunnudagin sópaði Neistin snøgt sagt H71 av vøllinum, og teir skoraðu nærum eftir vild. Neistafólk fegnast óivað um góða úrslitið sunnudagin, og serliga hugaligt eigur tað at verða hjá teimum at staðfesta, at allir teir tíggju útileikararnir, ið vóru í hópinum, komu á máltalvuna. Tað vóru bara teir báðir málverjarnir, Zelkjo Jotic og Ári Dam, ið ikki komu á máltalvuna.

Hoyvíkingar eru óivað longu farnir undir fyrireikingarnar til komandi kappingarár, og teir fara ivaleyst at leggja høvdini á blot til tess at finna út av, hví kappingarárið hjá teimum hevur verið so misjavnt.

Tað er einki dulsmál, at H71 var tað felagið, ið fekk tilgongd av flest spælarum undan kappingarársbyrjan, og liðið fekk eisini eina flúgvandi byrjan upp á kappingarárið. Men serliga her í endaspælinum hevur tað gingið stak illa hjá hoyvíkingum, hóast teir hava nógv og gott fólk.

Enn er ikki greitt, hvør ið skal hava ábyrgdina av besta liðnum hjá H71 komandi kappingarár, men tað hevur ljóðað, at samráðingar eru við Henrik Gerstter um leingjan av sáttmálanum. Hinvegin er tað heldur ikki nakað dulsmál, at røddir hava verið frammi um, at venjarin átti at verið skiftur út.

### H71-Neistin 26-41 (12-21)

H71: Esbern Patursson 7((1), Johnny Durhuus 7(1), Høgni Joensen 3, Bjarni Jørgensen 3, Niels V. Niclassen 3, Olaf Vesturgarð 2, Christian Eli Zachariassen 1
Neistin: Damir Oros 9, Blagoje Buha 8(3), Áki Mørk 6, Ólavur Brimnes 5, Dan Thorleifsson 4, Rani Slættanes 3, Freddie Poulsen 2, Jón Ludvík 2(1), Helgi Michelsen 1, Leif Hákun Jacobsen 1
Brostkøst: H71 2(2), Neistin 4(4)
Útvísingar: Neistin 2
Dómarar: Geir Wardum og Gunnar Gregoriussen
Áskoðarar: 23